VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fyrrapartin lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Regn av og á og hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið sunnudagin:
Fleyr til gul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 8 og 11 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og mánadagin yvirhøvur turt, men týsdagin regn av og á. Hitin millum 6 og 10 stig.

– – –

Lýggjur november, 1,9° yvir miðal. Avfallið var um miðal.

Danmarksmeistarar telva á Bryggjuni

Rammurnar vera av teimum bestu, tá danmarksmeistarnir í talvi skulu telva ímóti Talvfelagnum Føroyar í donsku 1 deild

TALV
Tíðindaskriv

Talvfelagið úr Helsinge, sum hava verið danmarksmeistarar seinastu 3 árini skulu telva triðja umfar í donsku 1 deild ímóti Talvfelagnum Føroyar. Besti telvarin í Norðurlondum í løtuni, stórmeistarin Peter Heine Nielsen, situr á fyrsta borði hjá Helsinge. Fyrstu tvey umførini í kappingini telvaðu tveir stórmeistarar, 5 altjóða meistarar við liðnum hjá Helsinge, so tað verður ein sera torfør uppgáva hjá føroyska liðnum.

Aftaná tvey umfør hevur Helsinge longu lagt seg klárt á odda í kappingini um Danmarksmeistaraheitið. Tað má sigast at vera ein stór sensatión um nakað annað lið enn Helsing vinnur danmarksmeistaraheitið í ár. Føroyar liggja á einum deildum triðja plássi og føroyska telvarnir vilja gera alt fyri at varveita góðu plaseringina.

Talvfelagið Føroyar telvar sín fyrsta heimadyst í donsku fyrstu deild á Bryggjuni. Umstøðurnar at telva eru av teimum allarbestu í stásiligu hølunum. Telvað verður í sama sali, sum m.a. Guðrun sang í seinasta vikuskifti, tá ið hølini á Bryggjuni opnaðu fyri almenninginum. Eingin ivi er um at hetta eru nógv tey mest stásiligu hølir nakað talvfelað í Danmark hevur at telva undir. Hetta verður eitt gott høvi at sýna Bryggjuna fram og eitt gott høvi hjá føroyingum í Keypmannahavan at síggja hølini á Bryggjuni, um teir ikki fingu tað við seinasta vikuskifti.

Býráðið og fyritøkur í Klaksvík stuðla føroyska talvfelagnum í samband við dystin ímóti Helsinge á Bryggjuni. Klaskvíkingar hava jú altíð verið sera sjónligir í føroyska talvumhvørvinum í Keypmannahavn.

Føroyska talvfelagið í Danmark skal í fyrsta heimadystinum telva á Bryggjuni, har donsku meistararnir koma á vitjan

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷8
Nuuk	÷6
Qaqortoq	0
Ammassalik	÷5
Saint John's	0
Halifax	÷5
Reykjavík	5
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	8
Lerwick	8
Aberdeen	8
London	7
Tromsø	6
Bergen	6
Oslo	–
Stokkhólm	5
Keypmannah.	5
Helsinki	4
Moskva	0
Berlin	5
Warzawa	1
Kiev	0
Bukarest	3
Paris	8
Madrid	5
Róm	17
Malorca	11
Athen	13
Malta	19
Tunis	21
Beijing	1
New Dehli	21
Bangkok	32
Jakarta	31
Sydney	–
New York	÷1
Miami	23
Los Angeles	16
Meksikobýur	–
Panama	26
La Paz	18
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	25

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt djúpt lágtrýst, 964 hPa. við Lofoten hvørvur eystureftir. brúgvalagið haðani til havið sunnan fyri Føroyar verður við Oyggjarnar komandi samdøgur .



Hátrýstið vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur til Grønlandsfjørðin fer í landsynning.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 03/12 kl. 06⁰⁰– 04/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,1°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,8 mm – mált frá 03/11 kl. 06⁰⁰–04/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 2,9 mm

Morgunlestrar
8.–13. desember

Heri Joensen, prestur, lesur

Sálmar:

Mánadagin 8. desember:
nr. 516 Ljósið rann av kærleiks runni
nr. 88 Statt upp úr svøvni, tú, ið svevur

Týsdagin 9. desember:
nr. 154 Eg veit ein góðan seyðamann
nr. 488 Algóði Guð mín faðir er

Mikudagin 10. desember:
nr. 236 Tín andi, Guð, til Jesus Krist meg kalli

Hósdagin 11. desember:
nr. 388 Óttast ei, vak og bið

Fríggjadagin 12. desember:
nr. 101 Av himni hátt ein eingil ber

Leygardagin 13. desember:
nr. 221 Vakna, rópar vaktarmaður

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

VESTFALLSKYRRINDI

23. november: Mánin næstur jørðini
30. november: Fyrra kvarter
7. desember: Mánin longst frá jørðini
8. desember: Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
5. des	03.56	16.16	02.56	15.16	03.11	15.31	05.56	18.16	06.56	19.16	02.11	14.31	01.11	13.31	04.11	16.31	05.11	17.31	03.41	16.01	04.56	17.16
6. des	04.37	16.58	03.37	15.58	03.52	16.13	06.37	18.58	07.37	19.58	02.52	15.13	01.52	14.13	04.52	17.13	05.52	18.13	04.22	16.43	05.37	17.58
7. des	05.19	17.41	04.19	16.41	04.34	16.56	07.19	19.41	08.19	20.41	03.34	15.56	02.34	14.56	05.34	17.56	06.34	18.56	05.04	17.26	06.19	18.41
8. des	06.04	18.24	05.04	17.24	05.19	17.39	08.04	20.24	09.04	21.24	04.19	16.39	03.19	15.39	06.19	18.39	07.19	19.39	05.49	18.09	07.04	19.24

5 707265 100050 >